VIÐMERKINGAR

# Einki nýtt á barnagarðsøkinum



**Elin Lindenskov**
*býráðslimur í Havn*

Í samrøðu við Sosialin hósdagin lovar nývaldi borgarstjórin í Tórshavnar Kommunu at leggja doyin á at loysa trupulleikan á barnaansingini komandi fýra árini. Tað kann ikki sigast annað, enn at hetta eru sera góð tíðindi frá nýggja borgarstjóranum. Eg las greinina við spenningi, tí hetta eru nýggir tónar frá Fólkaflokkinum, sum annars ikki hevur víst nakaran serliga vilja at loysa málið seinastu árini.

At byrja við sær út sum um vilji er at loysa málið, tó torir borgarstjórin ikki at lova øllum børnunum pláss komandi fýra árini. Borgarstjórin leggur dent á, at vit hava nøktað tørvin hjá 75 prosentum. Hann sigur einki um, hvussu stóran part hann ætlar at loysa. Út frá samrøðuni við borgarstjóran, og samrøðuna við forkvinnuna í Sosialu nevnd við Útvaripð dagin fyri, kunna vit bert ásanna, at nýggi meirilutin í Tórshavnar Kommunu ikki hevur í hyggju at fylgja málsetninginum, sum undanfarna býráð setti sær, nevniliga at loysa barnaansingartørvin áðrenn 2003. Tey hava heldur ikki ætlanir um at hava 100 prosent barnaansing í Kommununi.

Jan Christiansen sigur, at í seinastu setu vóru loysnirnar av barnaansingini merktar av, at tað vóru hálvar loysnir. Til hetta má eg spyrja, hvørjar eru tær hálvu loysnirnar? Eg kenni so einki til nakra hálva loysn.

Í samrøðuni vísir Jan Christiansen á narkrar loysnir, allar loysnir sum undarnfarna býráð hevur fyrireikað og sett pening av til á verandi fíggjarætlan. Tá so er, er lætt at vísa á ætlanir. Fyrsta loysnin hann nevnir, er at ein ríðihøll í Havnardali skal hýsa einum útibarnagarði, eitt mál, Sosiala nevnd og Trivnaðardeildin hava arbeitt við í longri tíð, málið er ikki loyst enn, tí semja ikki er fingið um leigukostnaðin.

Síðani nevnir hann, at tað er betur at byggja smærri stovnar, tí at Barnagarðurin í Vesturbýnum er eitt dømi um, at tað tekur longri tíð at byggja størri stovnar. Rætt er, at tað hevur tikið alt ov langa tíð at byggja barnagarðin í Vesturbýnum, men at skylda uppá støddina er ikki rætt. Grundin til, at hesin stovnur hevur tikið so langa tíð, er politiskur óvilji, serliga frá teimum, sum nú sita í meirilutanum í býráðnum.

Jan Christiansen sigur eisini, at seinasta mánadag samtykti Byggi- og býarskipanarnevndin at gera eina stovu afturat í hesum stovninum til børn við serligum tørvi. Her fær Jan Christiansen tað at ljóða, sum um at hetta er nakað nýtt. Henda stovan hevur alla tíðina verið við í ætlanini. Upprunaliga skuldi ein spælistova til dagrøktina byggjast. Henda ætlan var tó slept rættuliga tíðiliga, tí vit mettu, at tørvur er á eini stovu til børn við serligum tørvi. Sosiala nevnd samtykti endaliga tann 5. desember 2000 at biðja býráðið um pening til hesa ætlan. Málið var fyri á býráðsfundi tann 14. desember 2000, tá var tað ein býráðslimur í núverandi meiriluta, sum fekk forhálað málið, soleiðis at tað skuldi aftur í nevnd. Sjálvandi fyri at fáa tað at síggja út sum, um at hetta var ein ætlan hjá nýggja meirilutanum, soleiðis sum borgarstjórin nú fær tað at ljóða.

Borgarstjórin vísir til Býlingahúsini, sum eru runt um í býnum. Ja, eg haldi eisini at vit skulu hyggja at býlingahúsunum, serliga teimum innfluttu. Tað er rætt, at hesi húsini vóru skjót og bílig. Vit mugu eisini hyggja eftir øllum trupulleikunum, sum hava verið við hesum innfluttu húsum. Øll eru umvald, tí tilfarið tey vóru gjørd úr, ikki hóskaði til tað Føroyska veðurlagið, leggja vit so meirkostnaðin afturat keypsprísinum, man verða minni munur á.

Tað einasta nýggja, eg dugi at síggja í hesi samrøðuni, er at vit skulu hava bíligari alternativar loysnir, men hvørjar hesar loysnir eru, sigur Borgarstjórin einki um. Hann sigur heldur einki um, hvønn politik nýggji meirilutin í Tórshavnar Kommunu ætlar at reka á barnaansingarøkinum.

Vit í minnilutanum, fara framhaldandi at arbeiða fram ímót 100 prosent barnaansing innan ár 2003. Tað sum vit vilja, er at útbyggja barnaansingar tilboðini, soleiðis at øll børn fáa tilboð um mennandi barnaansing, har børn og starvsfólk kunnu mennast og trívast.

# Góða Elin

**Beate L. Samuelsen**
*býráðslimur*



Sjálvandi vita vita um allar tær ætlanir og samtyktir, sum gjørdar eru at fáa loyst barnanansingartrupulleikarnar í Tórshavnar kommunu, har yvir 300 børn standa á bíðilista og sum undanfarna býráð við undanfarnu forkvinnu í sosialu nevnd ikki fekk herbergað fýra undanfarnu árini.

Øll tey tiltøk, sum fígging er fingin til og sum fígging nú skal fáast til fyri at fáa loyst henda spurning, skulu vit royna avgreiða í hesi býráðssetu.

Tað er í so bláoygt at halda, at nýggja býráðið fer at steðga tí, sum longu er farið í gongd og stungið út í kortið hesum málinum viðvíkjandi.

Sjálvandi gera vit ikki tað.

Og eg kenni væl til tær ætlanir, sum undanfarna býráð er komið við. Men tær røkka neyvan til at loysa allan spurningin, tí tað verða føddir nýggir føroyingar hvønn einasta dag, og flestu teirra skulu eisini hava ansingarpláss bæði áðrenn og eftir ár 2003 í okkara kommunu – umframt tær smábarnafamiljur sum flyta til kommuna.

Vit vita øll um allar teir stovnar og útibarnagarðar, sum eru á veg – eisini nær teir eru klárir at taka í brúk.

Hóast hetta koma vit neyvan at fáa loyst henda trupulleika 100 pst.

Tað varð meiri enn eina ferð upplýst av undirritaða upp undir valið í november.

Vit fara ikki at lova nakað, sum ikki kann haldast. Men vit taka undir við alternativum loysnum, sum onnur koma við, um so er, at allar treytir í sambandi við slíkt verða uppfyltar.

At fyritøkur vilja vera við at loysa barnaasingartrupulleikan, eru vit fegin um.

Tí er tað spell, tá fyrireikingararbeiði sum hetta hjá Føroya Tele av ávísum orsøkum dettur niðurfyri, tí tað kundi skunda undir at loyst barnanasingartørvin í kommununi uppaftur skjótari enn ætlað.

At kommunan nú hevur keypt Marinustøðina fer eisini at gera bíðilistan við børnum til ansing munandi stytri, um so er, at ein partur av húsunum skal brúkast til barnasning.

Men, góða Elin, tú veitst væl, at fyri tað um øll tey, sum standa á bíðilista fáa tilboð um ansingarpláss innan ár 2003, so eru fleiri børn komin aftrat, ja, ikki bara tey sum verða fødd fram til tína ásettu tíðarfreist, men eisini aftaná. Tey skulu vit eisini hugsa um.

Vit skulu nokk fáa loyst so nógv av teimum trupulleikum, sum vit megna – og kanska eitt sindur aftrat við hjálp frá fyritøkum, sum vilja taka undir við ætlanini at fáa børnini ansað.

Vónandi verður tú framvegis eins áhuga at hjálpa til í hesum arbeiði og tú hevur verið áður, soleiðis at talan ikki verður um nakra andstøðu, ið kemur at seta forðingar fyri tí, sum hetta býráðið kemur at útinna í verki á barnansingarøkinum.

Skuldi tað hent, at tú ikki gjørdi tað, klára vit tað alíkavæl.

# Glykogen-gloymsku-brek av slagnum III A – serføroysk sjúka

**Sepideh Taheri, yvirlækni**
**Odmar Færø, yvirlækni**
*Tíðindaskriv*

Tey seinastu árini eru vit vorðin varug við, at ein aðtastaðni ógvuliga sjáldsom sjúka, sum tey á enskum rópa »Glykogen storage disease type III A« rættiliga ofta kemur fyri í Føroyum. Á føroyskum kunnu vit rópa sjúkuna glykogengoymslu-brek, stytt GGB. Sjúkan kemur í hvussu so er líka ofta fyri sum viðføtt stoffskifti (myzødem) og tvær til tríggjar ferðir so ofta sum Föllings sjúka (fenylketonuri). Báðar hesar sjúkurnar verða øll nýfødd kannað fyri. Við tað at fólk ikki nýtist at merkja nakað til sjúkuna í fyrstani, halda vit, at tað er rímiligt at upplýsa bæði starvsfólki innan heilsuverkið og almenningin í Føroyum eitt sindur um hesa sjúkuna.

Aftaná at tú hevur etið, verður yvirskotið av kolhydratum (sukur) vanliga goymt antin sum feitt ella stívilsi í livrini, vøddunum ella hjartanum. Meira enn 15 ymisk sløg av GGB eru kend í løtuni. Tað slagið, sum vit hava sæð í Føroyum, hevur frámerkið »III A, amyloglukosidasu mangul« (ella eisini eftir teimum fyrstu, sum ávístu sjúkuna: »Cori-« or »Forbes-«sjuka.) Fólk við sjúkuni GGB eru ikki før fyri at nýta stívilsi og at umlaga tað til sukur, tá blóðsukrið lækkar. Í minsta lagi 12 fólk í Føroyum hava GGB III A. Til samanberingar verður mett at umleið 100.000 fólk í allari verðini hava sjúkuna. Hetta kundi bent á, at minst ein av tríati føroyingum er berari av sjúkuni. Berarin sjálvur er frískur, men um tveir berarar fáa eitt barn, eru tað 25% (t.v.s. ein av fýra) møguleikar fyri at hetta barn hevur sjúkuna. Síðan 1994 eru 6 børn í Føroyum fødd við GGB III A.

Vit á barnadeildini á Landssjúkrahúsinum fara at bjóða til fundar í Gestaborðstovuni á Landssjúkrahúsinum leygardagin 27. januar kl. 14, at greiða nærri frá sjúkuni:

- Hvørji eru sjúkueyðkennini hjá børnum?
- Hvussu eru sjúkueyðkennini hjá vaksnum fólki?
- Hvørjir eru viðgerðarmøguleikarnir?
- Hvørji eftirlit skulu fyriskipast?
- Hvussu kanst tú vita, um tú sjálvur ert berari av sjúkuni?
- Hvør eigur at vita um sína beratastøðu?

Ætlanin er at greiða frá á einum støði, ið almenningurin er førur fyri at skilja. Tað vera Bettina N. Hansen, 1. hjálparlækni á Landssjúkrahúsinum, Andrew Hicks, biokemikari, Sepideh Taheri, barnalækni á Landssjúkrahúsinum og Ulrik Steuerwald, fyrrverandi barnalækni á Landssjúkrahúsinum, sum greiða frá og svara spurningum.

Øll, sum hava áhuga at fáa meira at vita um hetta viðfødda brek, eru vælkomin.

# ítróttur

Nr. 15 • týsdagur • 23. januar 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Kunnu missa europeisku luttøkuna

**Í seinasta lagi í 2002 skulu føroysku feløgini ganga mótumiklu krøvunum hjá UEFA á møti. Verður hetta ikki so, kunnu liðini ikki luttaka í europeiskum høpi**

UEFA-REGLUR
*Jákup Mørk*

Boðini omanfyri ljóða bæði álvarslig og ógvuslig, men í verandi líki er boðini frá europeisku fótbóltssamgonguni ikki at misskilja. Øll lið, sum luttaka í europeiskum høpi skulu hava góðkenning frá fótbóltssambondunum í einstøku londunum.

### Tvey ára skiftis´tíð

Hetta er í fjør samtykt av aðalnevndini hjá europeisku fótbóltssamgonguni, og hava fótbóltsfeløgini í ymsu londunum síðani hetta fingið tvey ár til at ganga krøvunum frá UEFA á møti.

Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF, ásannar, at talan fyri føroysk feløg kann gerast um møtumikil, men at møguleiki er fyri, at hesi verða tillagað serføroyskum viðurskiftum, men at hetta tó ikki er nakað, sum føroysku feløgini eiga at taka sum ein kodda av nøkrum slag. Vandi er nevnliga fyri, at UEFA heldur fast um upprunaligu krøvini, og tá kann gerast tungt hjá føroysku feløgunum at fylgja við.

At fylgja við er tó neyðugt, at nakar møguleiki skal vera fyri at fáa fatur í UEFA-pengunum, sum europeiska luttøkan kastar av sær, og sum nú eisini verða býttir til tey liðini í bestu deildini, sum ikki vinna sær rætt til europeiska luttøku.

### FSF skal góðkenna

Tað verður FSF, sum skal umsita reglurnar hjá UEFA í Føroyum, og verður hetta gjørt soleiðis, at FSF fær heimil til at útgeva loyvi til feløgini. Eitt slag av lisensi kann hetta kallast, har FSF yvir fyri UEFA váttar, at felagið lýkur ásettu treytirnar.

Ísak Mikladal sigur í hesum sambandi, at FSF einki annað val hevur í hesum, enn at fylgja teimum krøvum, sum UEFA setir. Líkamikið um hesa verða í upprunaútgávuni ella í eini linari útgávu.

– Halda vit okkum ikki til reglurnar, kann eitt nú hugsast, at hetta fær avleiðingar fyri landsliðsfótbóltin, so her er einki at gera frá okkara síðu.

### Reglurnar

Sum skilst á aðalskrivaranum, er talan í hesum førum um umfatandi og drúgt lógarverk, men út frá samandráttinum, sum FSF gav feløgunum á fundi 25. november í fjør, kann í stuttum sigast, at reglurnar umfata hesi viðurskifti.

Ítróttarlig viðurskifit. Hetta inniber millum annað, at felagið skal hava eina ungdóms menningarætlan, skal hava útbúnar venjarar, hava eina ætlan fyri fatanarviðurskifti millum leikarar, venjarar og dómarar.

Fíggjarlig viðurskifti. FSF skal kunan hava eftirlit við fíggjarligu viðurskiftum felagsins, og inniber hetta millum annað, at gjøgnumskygni í fíggjarviðurskiftunum skal betrast, og at leiðslubygnaðurin í feløgunum skal mennast.

Persóns- og umsitingarlig viðurskifti. Her verður kravt, at felagið hevur ymsar serfunktiónir, og í samandráttinum verða m.a. nevnd starvsøkini: yrkisskrivari, trygdarovasi, fíggjarstjóri, høvuðsvenjari, leiðari av ungdómsmenningini, undirvísarar og heilsustarvsfólk.

Infrastrukturur og líknandi viðurskifti. Serstøk krøv til stadion og venjingaranlegg.

Lógarreglur. Hetta er meira formligi parturin, har tryggjað verður at alt pappírsarbeiði, m.a. í samband við omanfyristandandi, er sum tað skal.

### Avleiðingar

At meta eftir upprunakrøvunum hjá UEFA, er als eingin møguleiki fyri, at nakað føroyskst felag kann fáa góðkenning, tí millum annað verður sagt um vøll felagsins, at hesin skal hava 10.000 sitipláss.

Í hesum øki er kanska sjálvsagt, at føroyingar fáa sertreytir, men verða treytirnar ikki linkaðar á øðrum økjum, er stórur vandi fyri, at einki, ella í besta føri okkur teinstakt felag hevur møguleika at ganga hesum á møti.

Møguliga kann hetta gerast av størri feløgunum, men tað er ilt at ímynda sær, at lið av smáplássi flytir upp í bestu deildina, fyri síðani at lata upp skrivstovu, gera greiðan bygna fyri ungdómsdeildina (teir hava kanska onga), seta fjølmiðlaovasta o.s.fr.

Avleiðingin av øllum hesum kann lættliga hugsast tann, at tað í besta føri bert verða tey størru feløgini, sum koma at hava rætt til allar sveisarafrankarnar.

Í ringasta føri tann, at eingin fær rætt til hesar, at føroysku feløgini missa altjóða avbjóðingarnar, og at leikararnir í heimligu kappingin tí hava smærri menningarmøguleikar. Snøgt sagt ein ónd ringrás, har avleiðingin í seinasta enda verður tann, at føroyskur fótbóltur verður settur 15 ár aftur í tíðina. Oyggjaleikirnir verða størsta avbjóðingin, sum leikarar fáa, umframt møguliga onkran av søguligu landsdystunum móti hetlendingum.



*Vil heilt illa til, kann seinasat europeiska luttøkan hja føroyskum fótbólti verða komandi ár. Hetta, um so er, at UEFA krøvini frá 2002 at rokna gera føroyska luttøku ógjørliga*

# Løgmanssteypið byrjar 3. mars

**Eins og vanligt hava fótbóltsfeløgini og FSF havt fund, nú tað fer at stunda til aðalfundin hjá Fótbóltssambandinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Umframt at tosað varð leysliga um tey evni, sum frammn undan vórðu sett á skránna, so var mest áhugaverdi parturin av fundinum helst, hvussu leikast skal í kappingini í Løgmanssteypið, sum í ár er sett at byrja longu 3. mars.

Tá spæla liðini, sum ikki verða seedaði beinleiðis í bólkarnar um pláss í hesum, og eru hesi liðini TB, Royn, LÍF, AB, Sumba, Fram, ÍF og Skála.

Tvey av hesum vinna seg fram til bólkaspælið, har bólkarnir eru hesir:

Bólkur 1: KÍ, B71, B68 og eitt lið úr innleiðandi umfarinum.

Bólkur 2: GÍ, B3, HB og eitt lið úr innleiðandi umfarinum

Bólkur 3: FS Vágar, EB/Streymur, NSÍ og VB.

Sum nevnt, verður sjøtul settur á innleiðandi umførini 3. mars, og 17. mars fer bólkaspælið í gongd. Tey bæði fremstu liðini í hvørjum bólki, umframt teir báðir bestu 3'ararnir koma í fjórðingsfinaluna, sum verður spæld 22. apríl.

Hálvfinalurnar verða ávíkavist 13. og 24. mei, meðan tað ikki enn er greitt, nær finalan í kappingini um Løgmanssteypið skal spælast.

### Onnur mál

Av øðrum málum, sum vórðu nevnd á fundinum, var kanska størist spenningur um, um nakrar broytingar fóru at verða í kappingarreglunum, og sonevndu disciplinerreglunum.

Í kappingarreglunum vórðu sum so ikki framdar nakrar broytingar, men semja tykist tó at vera um, at kappingarnar fyri yngru deildirbar í størri mun verða loystar frá kappingunum fyri vaksnu deildirnar.

Viðvíkjandi disciplinerreglunum vórðu ongar broytingar framdar, men feløgini fingu eitt upplegg frá FSF, um hvussu hetta kundi verið skipað framyvir, og ætlandi verður ikki nakað sett í verk hesum viðvíkjandi, fyrr enn til aðalfundin næsta ár.

Sjálvur aðalfundurin hjá FSF skuldi ætlandi haldast í Norðurlandahúsinum hin 3. mars, men hetta er nú broytt, soleiðis at fundurin ístaðin verður hildin 17. februar. Enn er tó ikki greitt, hvar fundurin verður hildin.